# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Vit ætla at fullføra málið ímóti Karadzic sum skjótast, men taka sjálvandi fyrilit fyri galdandi rættindum*

*Serge Bremmertz, ákæri*

# 2.200 neyðtøkur í Kongo tann seinasta mánaðin

**Uppreistrarmenn og stjórnarhermenn hava neyðtikið meiri enn 2.200 kvinnur har eysturi í Kongo**

Bæði stjórnarhermenn og hermenn hjá uppreistrarherinum í landslutinum Norður Kivu har eysturi í Kongo gera seg framvegis inn á kvinnurnar, og bara tann seinasta mánaðin hava myndugleikarnir fingið fráboðan um meiri enn 2.200 neyðtøkur, stendur í einari nýggjari frágreiðing.

Í veruleikanum hava teir stríðandi partarnir skrivað undir eina vápnahvíldaravtalu, sum ST hevur eftirlit við, men ágangurin ímóti sivilfólkinum stendur kortini við. Sum vant eru tað kvinnurnar, sum eru fyri tí ringasta ágangINUM, og tær kunnu ongantíð kenna seg trygggar.

- Í juni fingu myndugleikarnir fráboðanir um meiri enn 2.200 neyðtøkur, og tá tosa vit bara um Norður Kivu. Vit ivast ikki í, at støðan er líka ring aðrastaðni, og at tað veruliga talið tí er nógv størri, sigur hjálparfelagsskapurin Congo Advocacy Coalition.

Í 2006 var tjóðartingsval í Kongo, og valið skuldi ætlandi gera enda á borgarakrígnum og ruðuleikanum í landinum. Men hóast partarnir eisini samdust um eina friðaravtalu í januar, heldur ágangurin ímóti sivilfólkinum fram, og sum vant eru tað serliga kvinnurnar og børnini, sum eru fyri ágangi.

Uppreistrarleiðarin Jean-Pierre Bemba kom fyrr í hesum mánaðinum fyri altjóða krígsbrotsmannadómstólin í Haag. Har er hann millum annað ákærdur fyri at hava ábyrgdina av, at hansara menn hava neyðtikið ein hóp av kvinnum.



*Ein kvinna við barni á baki uttan fyri Kinshasa*
*Mynd: AFP*

# Russar kavaðu á botn á Bajkalvatninum

**Í tveimum smáum kavbátum eydnaðist tað russiskum granskarum at kava niður á botn á Bajkalvatninum, sum er tað djúpasta í heiminum**

Bajkalvatnið har eysturi í Sibiria er 1.680 metrar djúpt, og við at kava niður á botn har hava teir russisku granskararnir sett nýtt heimsmet við kaving í feskvatni, sigur BBC.

Endamálið við ferðini er at fáa betri kunnleika til viðurskiftini niðri botni og ta serstøku vistskipanina í vatninum, sum hevur umleið ein fimtapart av øllum feskvatni í heiminum.

Kanningar fyrr hava víst, at Bakjalvatnið lá ikki undir ísi í teirri seinastu ístíðini, og tað hevur gjørt, at plantu- og djóralívið har er nakað heilt serligt. Eitt nú eru tey flestu djórasløgini, sum halda til í Bajkalvatninum, ikki at finna nakra aðrastaðni í heiminum. Tvey tílík dømi eru bajkalkópurin og omul-laksurin.

Síðani 1996 hevur Bajkalvatnið staðið á listanum hjá Unesco sum heimsarvur.



*Annar kavbáturin verður loraður niður á vatnið*
*Mynd: Polfoto*

## STUTT SAGT

### Oljan verður bíligari

Formaðurin í OPEC-felagsskapinum, Chakib Khelil, hevur eftir øllum at døma broytt hugsan um gongdina í oljuprísinum. Fyri einum mánaði síðani segði hann, at prísurin kundi fara upp í 170 dollarar fyri tunnuna fyri árslok, men nú sigur hann, at prísurin kann koma niður á 70 dollarar. Tað sigur hann við Bloomberg-tíðindastovuna.

Matthew Lynn, oljuserfrøðingur hjá Bloomberg-tíðindastovuni, væntar eisini, at oljan verður bíligari í næstum. Hann væntar, at prísurin fer niður um 70 dollarar í næstum.



*Oljuprísurin fer at fella, sigur OPEC-formaðurin*
*Mynd Polfoto*

### Prestur funnin

Brasilsku myndugleikarnir hava funnið líkið av brasilska prestinum Adelier Antonio de Carli. Myndugleikarnir hava leitað eftir prestinum, sum hvarv á einari ballónferð úti fyri brasilsku strondini fyri tveimum mánaðum síðani. Brasilsku myndugleikarnir siga, at ein sleipibátur fann líkið av prestinum.

Tað var tann 20. februar, at Adelir de Carli fór avstað á ballónferðina, men longu stutt eftir fráferðina boðaði hann frá, at hann hevði trupulleikar og var um at detta í havið.



*Ballónferðin hjá brasilska prestinum miseydnaðist*
*Mynd: AP*